## Flaggdagshald í London

Mikudagin 25. apríl skipar Sendistova Føroya í London fyri almennari móttøku í sambandi við flaggdagin.

Á móttøkuni fer Bjarni Djurholm, varaløgmaður, at halda røðu, umframt at Lena og Niclas fara at undirhalda við tónleiki.

Eins og í fjør fer hátíðarhaldið fram á The Arts Club nærhendis St. James´ Park í London, har møguleiki verður hjá føroyingum at hittast til prát og hugna. Hövi verður eisini at njóta spritubitar og okkurt drekkandi afturvið.

Fyrri partur av tiltakinum er bert fyri innbodnar almennar gestir. Seinni partur av tiltakinum, sum byrjar kl. 18, er opin fyri almenninginum, ið tó av trygdarávum skal boða frá luttøku frammanundan.

Áhugað verða biðin um at boða frá luttøku við at senda ein teldupost til info@tinganes.fo ella við at ringja á tlf. 020 7333 0227 (ella 020 7333 0200). Allir luttakarar skulu upplýsa navn og bústað. Atgongdin er avmarkað, og tí verður mælt til at boða frá luttøku skjótast gjørligt. Seinasta freist at boða frá er týsdagin 17. apríl.

Tíð og stað: Mikudagin 25. apríl, kl. 18.00 – 20.00
The Arts Club
40 Dover Street
London, W1S 4NP

# Havsbrún keypir nógvan svartkjaft

**Í páskavikuni og um páskirnar førdu føroysku svartkjaftaskipini stóran fong til lands, og á Havsbrún hava bæði landarar og tey, sum eru í móttøkuni og framleiðsluni á virkinum, havt úr at gera seinastu dagarnar**

SVARTKJAFTUR
Vilmund Jacobsen
vilmund@sosialurin.fo



*Ein vøkur sjón, halda fuglfirðingar. Risaskip við bryggju, fullfermd við svartkjafti, samstundis sum Norrøna fer grøvandi norður ígjøgnum Dúpini. Myndin er tikin 2. páskadag*

Mynd: Sigurd Simonsen

Myndina, vit prenta saman við hesi greinini, tók borgarstjórin í Fuglafjarðar kommunu, Sigurd Simonsen, um 18-tíðina 2. páskakvøld.

Ytst úteftir norðara armi á Fuglafirði liggur Fagraberg við umleið 3.000 tonsum, og beint frammanfyri hann liggur Christian í Grótinum við stívliga 2.000 tonsum.

Bæði skipini eru at kalla fullfermd við svartkjafti.

Skipið, sum ikki sæst á myndini, men sum í hesi løtu, myndin er tikin, liggur og landar, er Jupiter, sum man hava út við 2.000 tons.

Høgaberg hevur eisini landað í Fuglafirði um páskirnar, og tá hann var liðugur, slapp Jupiter fram at.

### Út at gera

Havsbrún landar eitt skip í senn, og tað gongur skjótt fyri seg, tí virkið megnar at draga undan eini 2000 tons um samdøgnið.

Tá henda myndin er tikin, liggja Christian í Grótinum og Fagraberg og bíða eftir landingartørni.

Fagraberg liggur við nýggju oljubryggjuna í Fuglafirði, og Christian í Grótinum liggur við frystibryggjuna, beint niðanfyri Bergfrost.

Havsbrún hevur seinastu dagarnar tikið ímóti stórum nøgdum av svartkjafti, og um páskirnar høvdu bæði landarar og fólk á virkinum soleiðis úr at gera.

# Stór skip sum krevja nógv pláss

**Tað er ikki bara sum at siga tað hjá eini kommunu at taka ímóti so stórum skipum sum teimum, ið eru grundarlagið undir virkseminum á Havsbrún í Fuglafirði. Men kommunan hevur ásannað tað neyðuga í, at umstøðurnar eru góðar**

FUGLAFJØRÐUR
Vilmund Jacobsen
vilmund@sosialurin.fo



*Skipini eru velduga stór og taka nógv pláss við bryggjuna í Fuglafirði*

Mynd: Vilmund Jacobsen

Nýggja oljubryggjan, sum Fuglafjarðar kommuna hevur latið byggja, er 65 metrar long, og hevur eitt dýpið, sum er heilar 14 metrar. Hon telist soleiðis millum djúpastu havnir í Føroyum – fyri ikki at siga tann allar djúpasta.

- Tað ljóðar rímiliga nógv, at nýggja oljubryggjan er 65 metrar long, men skipini, sum koma higar, eru sum øllum kunnugt rættiliga stór, og stundum hava vit fleiri skip inni á Fuglafirði í senn.

Sigurd Simonsen, borgarstjóri, vísir á, at Fagraberg, sum seinastu dagarnar hevur ligið við oljubryggjuna, er heilar 82,05 metrar langur, og tá røkka endarnir út um bryggjukantarnar.

- Frystibryggjan beint frammanfyri Bergfrost, har Christian í Grótinum hevur ligið og bíðað eftir landing, er 55 metrar long, men tá Christian í Grótinum er 74,5 metrar langur, er heldur ikki hendan bryggjan líka long sum skipið.

Hann sigur, at bryggjan við mjølsiloirnar eisini er 55 metrar long, og bæði frystibryggjan og bryggjan við siloirnar hava eitt dýpi, sum er 13 metrar.

- Vit hava eitt væl útbygt virki á Havsbrún, sum hevur stóra móttøku- og framleiðsluorku, og tá ið tað gongur væl, kann virkið taka alt undan, sum kemur upp úr skipinum, eini 2000 tons um samdøgnið.

Aftrat hesum hevur virkið tangar, sum fiskurin kann koyrast í, áðrenn hann verður virkaður inn á virkinum.

- Við tað at framleiðsluorkan á virkinum er so stór, hevur virkið onga orsøk til at landa meira enn tað eina skipið í senn, heldur borgarstjórin.

Hann veit annars at siga, at tríggir oljutangar til tungolju skjótt koma upp úti við nýggju oljubryggjuna, og hann heldur, at hesir tilsamans fara at rúma út við 20.000 tonsum av olju.

- Kommunan hevur bygt bryggjuna og planerað økið, og nú fara so teir, ið eiga verkætlanina, at seta tangarnar upp, sigur Sigurd Simonsen.

Borgarstjórin nýtir eisini høvi at fegnast um tað stóra virksemi, sum er við havnalagið í Fuglafirði og heldur, at framtíðin hjá kommununi og fólkinum á staðnum er bjørt.

- Alt hetta virksemi hevur ein ómetaliga stóran og avgerandi týdning fyri okkum, sigur Sigurd Simonsen.

Fuglafjarðar kommuna arbeiði longu aftur við nýggjum ætlanum um útbygging av havnalagnum, sum vit fara at frætta meira um seinni.



*- Alt hetta virksemi hevur ein ómetaliga stóran og avgerandi týdning fyri okkum, sigur Sigurd Simonsen, borgarstjóri*

Mynd: Vilmund Jacobsen